


Hotel Føroyar søkir eftir fólki til móttøkuna at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til móttøkuleiðaran. Starvið umfatar ma.: Eina professionella kundatænastu, inn- og útskriving av gestum, telefonavgreiðsla, bíleggingar, søla av kioskvørum og aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
- Er smílandi og fyrikomandi
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur kunnleika til enskt og KT

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Avbjóðingar á altjóða støði
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Unn Hilduberg, móttøkuleiðari á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 22. september 2003.

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir barrleiðara (m/k) til barrirnar á hotellinum at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til yvirtænaran. Starvið umfatar ma.:

- Ábyrgd av barrunum á hotellinum
- Eina professionella kundatænastu
- Skeinkjan av sterkum drykkjum
- Skipa virksemi í barrunum
- Aðrar viðkomandi uppgávur

**Umsøkjarin**
- Er álítandi og fyrikomandi
- Er smílandi og løtt/løttur av lyndi
- Hevur góð samstarvsevni
- Kann veita eina góða og skjóta tænastu

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Virgar Enghamar á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 22. september 2003.

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Handverkari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi handverkara (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinusmiður, maskinsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda Landsverkfrøðinginum, Postsmoga 78, 110 Tórshavn og skulu vera skrivstovuni í hendi seinasta lagi 01. oktober 2003. Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 422420 og tosa við Jóan Petur Patursson, leiðara av maskindeildini ella Niels Juul Kristiansen, smiðjuformann.

# Til Sølu



**IVECO 85E21 við 6 tons krana,**
**3 vegis vippu og hydralikk baklúku.**
**Motorur 210 HK, koyrt 89.000 km.**

**Telefon 312779 ella 212779**

Sosialurin 341800

# Grillbar til sølu

Um hóskandi boð fæst er grillbarr til sølu.

Gólvvíddin 147 kvm. Sera vælegnað til ymiskt handilsvirksemi.

**Tlf. 373193 ella 373990**

# Konfirmatións-klæðir til hansara



*fáast í*

**Kallkyn** Vágsbotnur Tel. 31 62 06

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01






Glasstovan søkir eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir, har lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/løttur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Virgar Enghamar á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 22. september 2003

★★★★ GLASSTOVAN *The Favourite Restaurant*

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870

# Varaleiðari í Fótbóltssambandi Føroya

Starvið sum varaleiðari í Fótbóltssambandinum verður við hesum lýst leyst til setan 15. oktober 2003 ella eftir nærri avtalu.

**Møgulig málsøki:**
- Minstukrøvini frá UEFA til feløgini
- Lógir og reglur hjá FSF, FIFA, UEFA og ÍSF
- Landsliðsmál

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- kunnleika til føroyskan fótbólt
- kunnleika til fyrisiting
- hollan kunnleika til enskt og føroyskt
- góðan kunnleika til brúk av teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi sjálvstøðugt starv, krevjandi og til tíðir strævið, men áhugavert og mennandi. Løn eftir avtalu.

**Umsóknir:**
Umsókn við møguligum upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

**Fótbóltssamband Føroya**
**Postrúm 3028, 110 Tórshavn**

Umsóknirnar skulu vera Fótbóltssambandinum í hendi seinast 1. oktober 2003

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ísak Mikladal, aðalskrivara, tel 21 19 88

Sosialurin 341800

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Avloysarastarv á Umhvørvisdeildini

Søkt verður eftir starvsfólki við umhvørvistekniskari ella akademiskari útbúgving til avloysarastarv á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørvisverndarlóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:
- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera uppskot til reglur og kunngerðir innan økið
- gera fakligar metingar av umhvørvisfrágreiðingum frá feløgunum
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd.

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísind ella verkfrøði.

Starvið skal setast skjótast tilber, og er setanin avmarkað til 31. desember 2004. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tilíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin hin 30. september 2003.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jacob Paula Joensen, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra.

# Starvsfólk til Frukt- og grønmetisdeildina og blómudeildina

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- eina deild í framhaldandi vøkstri og alla tíðina við nýggjum avbjóðingum og broytingum
- eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi
- góða løn eftir avtalu og førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt við fjølbroyttum hugflogi
- at tú kanst arbeiða bæði innan- og uttandura
- at tú framhaldandi kanst skapa eina spennandi, tiltalandi, nøktandi og kundavinarliga deild, sum í dag hevur sera gott orð á sær.

**… Og meira um bæði størvini:**
**Setan:** Skjótast gjørligt eftir avtalu.
**Løn:** Sambært avtalu.
Meira fæst at vita um størvini við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217593 og fáa eitt prát við leiðaran **Bo Møller.**

Skrivlig umsókn saman vð viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 24. sept. 2003.

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6
Boks 349
110 Tórshavn

**KEYPSSAMTØKAN**
**DR. JAKBOSENSGØTA**